# Taliban ógildar friðaravtalu

Taliban-rørslan í útnyrðingspartinum av Pakistan sigur, at friðaravtalan, sum hon gjørdi við pakistonsku stjórnina í februar í 2008, verður sett úr gildi. Eftir avtaluni fekk Taliban heimild til at brúka sharia-lógirnar í økinum, og sum samsýning skuldi rørslan gevast við sínum bumbuálopum og átøkum í Pakistan sum heild. Taliban hevur kortini ikki hildið sín part av avtaluni, og tí hevur pakistanski herurin gjørt fleiri álop á støðir hjá rørsluni teir seinastu mánaðirnar. Nú Taliban setir friðaravtaluna úr gildi, væntar pakistanska herleiðslan, at rørslan fer at herða mótstøðuna ímóti herinum og at elva til ófrið í økinum.



# Russar spæla við eld

Russiski herurin skipar í hesum døgum fyri einari stórari venjing í Kaukasus-fjøllunum, og sambært eygleiðarum skal venjingin vísa, at herurin stendur tilbúgvin, hóast átøkini í grannalandinum Georgia eru av. 8.500 hermenn við 200 stríðsvognum eru við í venjingini. Myndugleikarnir í Georgia hava fordømt russisku venjingina og siga hana vera hættisliga, og georgiski uttanríkisráðharrin, Alexander Nalbandov, hevur sagt, at russar spæla við eld. Georgiska stjórnin hevur sagt, at herurin er umskipaður og útgjørdur av nýggjum, og at hann er líka sterkur sum undan samanbrestunum við russar í fjør.




*Sum fíggjarliga støðan er nú, er Helena Dam á Neystabø ikki serliga bjartskygd fyri ætlanini at byggja eftirskúla í Hvalba, tí hon vil hava eina bíligari loysn*

# Eftirskúlin í Hvalba flytast til Sumbiar

**Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, heldur at tað er betri at gera skúlan í Sumba til eftirskúla, heldur enn at byggja ætlaða eftirskúlan í Hvalba**

EFTIRSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sum búskaparliga støðan er nú, heldur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, at tað er ov dýrt at byggja ein nýggjan eftirskúla í Hvalba, soleiðis sum tosað hevur verið um í fleiri ár nú.

Tað sæst í einum svari, hon gevur Kára á Rógvi, tingmanni, sum hevur spurt hana um eftirskúlan í Hvalba.

Ístaðin fyri at byggja nýggjan skúla í Hvalba, roynir Helena Dam á Neystabø at fáa kommunurnar í Suðuroy til at gera ein eftirskúla í onkrum av teimum skúlabygningunum, sum longu eru í Suðuoynni.

Sjálv heldur hon, at skúlin í Sumba er serstakliga væl egnaður til endamálið.

Hon sigur, at nú bæði landið og kommunurnar eru í svárari fíggjarligari støðu, vónar hon at finna semju um eina alternativa loysn, sum er bíligari, og sum bæði landið og kommunurnar kunnu arbeiða víðari við.

Fyribils hava kommunurnar í Suðuroy kortini havnað hesum tankanum, tí tær halda fast um, at eftirskúlin skal vera í Hvalba.

Harafturat vísir landsstýriskvinnan á, at tað er neyðugt at fáa eina greiðari mynd av, hvusu stórur tørvur er á eftirskúlum í Føroyum.

Hinvegin vísir hon eisini á, at verður Suðuroy vald til eftirskúlavirksemi í Føroyum, kunnu háskúlar, ymiskt skapandi virksemið og annað útbúgvingarvirksemi, ið liggur upp at einum eftirskúla, eisini mennast í Suðuoynni.

Men í hesum føri heldur hn, at tað er neyðugt at gera eina gjølliga greining av, hvørjar útbúgvingar eiga at vera í Suðuroy.

## Yvir 60 ungdómar høvdu farið á eftirskúla í Hvalba

**Ein kanning vísir at hevði eftirskúli verið í Hvalba, høvdu 65 næingar í 9. flokki tikið av einum slíkum tilboði**

EFTIRSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í sambandi við ætlanina at byggja eftirskúla í Føroyum, hevur tað eisini verið umrøtt, hvussu stórur tørvur tað er á einum slíkum skúla í Føroyum.

Í einum svari til Kára á Rógvi, løgtingsmann, staðfestir Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, at so vítt hon veit, eru ongi hagtøl, sum lýsa tørvin á einum eftirskúla.

Men í apríl mánaði í ár, sendi mentamálaráðið spurnarblað til allar næmingar í 9. Flokki í Føroyum og spurdi teir, um teir høvdu havt áhuga at farið á einum eftirskúla í Hvalba

Allir skúlarnir svaraðu uttan Tvøroyrar skúla og Felagsskúlanum á Oyrarbakka.

Av teimum 634 næmingunum, sum svaraðu, søgdu 65, at teir høvdu farið á ein eftirskúla í Hvalba.

Hinvegin er ongin kanning gjørd ímillum føroyingar uttanlands fyri at vita, hvussu nógvir høvdu komið heim til Føroya á ein eftirskúla.